## Oddagrein

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*



# SLEPPA IKKI UNDAN ÁGANGI

Umhvørvisfelagsskapurin Sea Shepherd hevur nú aftur vent eyguni ímóti Føroyum. Umboð fyri felagsskapin hevur verið í Føroyum og sneytað, og tað eydnaðist umboðnum at uppliva eitt grindadráp í Klaksvík í vikuni. Sea Shepherd maðurin tók myndir og hevur latið upplýsingar til eina frágreiðing á heimasíðuni hjá Sea Shepherd um drápið.

Tað er ikki við mýkindum, at føroyingar og grindadrápið verða viðgjørd í greinini. Sum vanligt hevur verið hjá Sea Shepherd, verða nógvar snildir brúktar fyri at geva fólki eina fatan av, hvussu ræðuligir føroyingar eru. Orðavalið og valið av upplýsingum leggja upp til at geva fólki eina skakandi mynd av grindadrápinum – og tað er lítið at ivast í, at hetta eisini eydnast. Grindadrápið er eitt slakt, tað er blóðugt, og við røttu vinklunum og myndunum ber til at gera drápið dramatiskt og eirindaleyst. Og tað ger Sea Shepherd, so tað stendur eftir.

Seinastu tíðina hevur umrøðan av grindadrápinum í útlendskum fjølmiðlum verið nakað meira, enn hon ofta hevur verið, men soleiðis hevur gongdin vanliga verið. Tað kann verða friðarligt í eina tíð, men føroyingar skulu gera sær púra greitt, at so leingi grind verður dripin í Føroyum ber ikki til at sleppa undan hesi umrøðu. Og tá umhvørvisfelagsskapir sum Sea Shepherd leggja brenni á bálið er væntandi, at fjølmiðlar – ikki minst í hesi summartíð – fara at taka evnið upp.

Føroyingar skulu rokna við, at næstu tíðina verður meira umrøða av grindadrápinum, og at tað nógvastaðni verður mett sum vánalig umrøða av Føroyum. Føroysku myndugleikarnir eiga at verða á varðhaldi nú og fyrireika seg til at svara spurningum um grindadrápi og taka ímóti mótmælum.

Kjakið um, hvørt føroyingar skulu drepa grind ella ikki kann sjálvandi takast upp, men undirtøkan fyri drápinum vísir, at tað man verða stórur meiriluti millum fólk fyri at halda fram við grindadrápinum – og tann veruleikan mugu føroyingar so bara fyrihalda seg til.



Annar spurningurin er so, hvussu seinasta trekkið hjá Sea Shepherd skal skiljast. Er hetta fortroppurin, sum er sendur til Føroya fyri at slóða fyri enn einari vitjan av fólkunum hjá Paul Watson, ella er endamálið bara at halda grindini á kók í eina tíð frameftir? Tann spurningurin verður ivaleyst svaraður í næstu framtíð.

> **So leingi grind verður dripin í Føroyum ber ikki til at sleppa undan hesi umrøðu**

# Taka Okkara til sín

Ølið frá nýggja bryggjarínum á Velbastað er væl móttikið av føroyingum.




Tað heldur í hvussu er stjórin, Wilhelm Petersen, sum sigur, at sølan hevur gingið betur enn væntað.

– Vit komu jú á marknaðin við trimum dósum, og mánadagin kom so fyrsta serølin, sum allar væntandi verða á fløsku. Talan er um ólavsøkuølina, Okkara Ólavur, sigur Wilhelm Petersen.

Tað hevur alla tíðina verið ætlanin við bryggjarínum, at teir skulu bryggja serølir til serlig høvi.

– Næsta serølin kemur væntandi einaferð tíðliga í heyst. Tað hevur leingi verið ein trendur uttan um okkum, at ølfjepparar dyrka øl, eins og vit kenna tað frá víni, sigur Wilhelm Petersen.

Afturmeldingarnar, sum teir á Okkara hava fingið higartil eru góðar.

– Tað er serliga pilsnarin og gullin, sum fólk tykjast hava tikið til sín. Og tað, vit hava frægt frá ólavsøkuølini er eisini sera positivt, sigu Wilhelm Petersen.

Hvussu tað annars verður við Okkara Ólavi veldst alt um, hvussu ølin verður móttikin.

– Hon er bryggjað eftir belgiskum ølkunsti, og inniheldur meiri humlu enn tær vanligu ølirnar. Hetta merkir samstundis, at talan ikki er um eina øl, sum tú hvølir í teg, men heldur um eina øl, at njóta aftur við matinum í staðin fyri vín, sigur Wilhelm Petersen.

Tað skilst á lagnum, at serøl ætlandi skal koma út til ymisk serhøvi, og ikki bara til jóla og páska.

Tað liggur eisini í kortunum, at Okkara skal líta út um landoddarnar.

– Tað er greitt, at vit hugsa tann vegin. Hinvegin hevur gingið so væl og so skjótt, at vit ikki í løtuni hava kapasitet at hugsa út um heimamarknaðin. Men tað er einki at ivast í, at Keypmannahavnarøkið hevði verið áhugavert, og á tí ølmessu, sum vit vóru á í Valby, var sýndur áhugi fyri okkara øli, sigur Wilhelm Petersen.

Eisini íslendski marknaðurin er ein møguleiki, men – sum stjórin sigur – fara vit út um landoddarnar, skal tað gerast ordiligt.

Og fyribils má so sigast, at Okkara hevur lagt ordiliga frá landi.

*leo@sosialurin.fo*



**Hetta er tað, samgongan vil**

STEINBJØRN O. JACOBSEN
KJAK Á SÍÐU 11



**Peikað varð í allar ættir**

HELGI ABRAHAMSEN
KJAK Á SÍÐU 11

# Berlusconi leggur taktikkin

Silvio Berlusconi smæðist ikki. Ráðaríki forsetin í italska fótbóltsfelagnum AC Milan setti seg sjálvan í miðdeplin, tá ið fyrsti tíðindafundur var í AC Milan síðani summarferiuna. Spælarar og venjari hjá AC Milan vóru á tíðindafundinum saman við Berlusconi, men tað var forsetin sjálvur, sum vildi svara spurningum frá fjølmiðafólkunum – eisini tá tað var um taktikkin hjá liðnum, sum venjarin vanliga leggur.

– Milan skal ikki longur spæla við bert einum manni í álopinum. Vil mann vinna, so skulu vit hava tveir mans nær málið hjá mótstøðuliðnum, segði Berlusconi og fanst at undanfarna venjara hjá Milan.

– Mær dámdi Leonardo, men eg var púra ósamdur í hansara taktisku avgerðum. Ronaldinho skal altíð spæla aftanfyri álopsspælaran, sjálvt um hann hevur hug at fara út í vinstru síðu, segði hann.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*